



**ÓHEPPIN**

*Ólavur í Ólavsstovu fekk ikki ta bestu byrjanina í NSÍ, tí stutt undan kappingarbyrjan breyt hann armin. Men nú hevur hann armin í skinnara, og í gjár spældi hann tað mesta av dystinum ímóti Víkingi*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

# Ólavur í gulum

**VODAFONEDEILDN** 21 ára gamli miðvallarspælarin, ið er best kendur frá HB, hevur í ár valt at spæla við NSÍ

**Hilmar Jan Hansen**

Ein av nýggju monnunum hjá NSÍ er 21 ára gamli havnarmaðurin, Ólavur í Ólavsstovu, sum yvir eini fýra kappingarár hevur verið at sæð á besta liðnum hjá HB, men nú hevur lagt leiðina inn til Runavíkar. Undan tí hevur hann fyrr í eitt hálvt ár spælt við FS Vágum og eisini á ungdómsliðnum niðri, umframt at hann hevur verið á flestu av ungdómslandsliðunum.

– Hóast eg fyri tað mesta havi spælt við HB, so er tað ein góð kensla at spæla fyri NSÍ. Tá tú ert inni á vøllinum, hugsar tú ikki so nógv um, hvussu liðið eitur, men spælir fyri tað liðið, tú ert á, sigur 21 ára gamli miðvallarin, ið annars ikki júst hevði ta bestu byrjanina upp á kappingarárið, tá hann breyt armin undir venjing.

– Ja, tað byrjaði eitt sindur illa, tí eg breyt armin, men eg eri so komin í gongd, og fyribils spæli eg við einum skinnara, til armurin er styrknaður eitt sindur meira.

Sum vera man, er Ólavur í Ólavsstovu ikki serliga fegin um ta heldur vánaligu byrjan, NSÍ hevur fingið hetta kappingarárið, men kortini hevur hann ikki mist trúnna á, at tað fer at venda.

– Vit fara á vøllin hvørja ferð fyri at vinna, og tað broytist einki, fyri tað um støðan ikki er so góð. Sjálvandi vildu vit gjarna havt fleiri stig, men soleiðis er fótbóltur nú eina ferð, sigur hann.

**» Vit fara á vøllin hvørja ferð fyri at vinna, og tað broytist einki, fyri tað um støðan ikki er so góð**

– Kapingin er ung enn, so vit fáa nokk fleiri møguleikar at rætta upp á vánaligu byrjanina.

*hilmarjan@sosialurin.fo*